DAGSINS MEINING

Hvat ger løgmaður!

Í dag ella í morgin fer løgmaður aftur til arbeiðis. Fremst á borði sínum liggur eitt álvarsmál, sum løgmaður at tosa nøkur álvarsorð um við sín varaløgmann. Hetta verður eingin behagilig samrøða. Kann tað hugsast, at hon verður endabresturin hjá hesi samgonguni? Løgmaður hevur úttalað seg um skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen og hevur sagt, at tær koma ikki at standa í leysari luft. Hvat løgmaður fer at krevja av sínum samgongufeløgum er óvist. Hann fer uttan iva at spyrja Hoydal, um hann var vitandi um skuldsetingarnar, áðrenn tær fóru á prent. Hoydal fer helst at svara, at tað er talu- og skrivifrælsi í Tjóðveldisflokkinum, og at hann sum formaður leggur seg ikki út í tað, sum tingmenn meina. Hann fer at endurtaka fyri løgmanni, at umrødda mál er eitt persónligt mál millum Tobba og løgmann. Áhugavert verður at vita, hvat løgmaður fer at svara og gera.

Í okkara verð er skuldsetingin móti løgmanni so grov og álvarslig, at hon má fáa avleiðingar fyri samstarvið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Løgmaður fer uttan iva at krevja av formanni Tjóðveldisfloksins, at flokkurin kemur við eini umbering og tekur avstand frá skuldsetingunum. Hoydal hevur víst seg at vera meistari í at "loysa" slíkar kreppur og man hann tí eisini vera maður fyri at loysa hesa. Spurningurin er bara, hvat kann sissa løgmann. Er tað nokk, at flokkurin al-ment sigur frá, at hann tekur ikki undir við skuldsetingunum hjá Tobba? Fer løgmaður at krevja, at Tobbi sjálvur er við í hesi umbering? Fer hann at góðtaka, at Tobbi verður "loystur" úr tingsessinum eina tíð og harvið ikki er partur av samgonguni meira?

Hvat løgmaður enn fyritekur sær, eigur hann at vita, at fólk hava lítið álit á eini samgongu, ið ein mánað eftir føðingina, er við at fara úr límingini. Løgmaður eigur eisini at vita, at fær hann ikki reinsað seg, fær hann ikki Tjóðveldisflokkin at koma við treytaleysari umbering, so verður tað eitt fólkakrav, at hann slítur alt samstarv við Tjóðveldisflokkin.

Tórbjørn Jacobsen leggur løgmann og ein landsstýrismann undir tað, ið líkist nøkrum kriminellum vil kendur advokatur vera við. Maðurin er ikki hvør sum helst. Hann er bæði løgtingsmaður og fólkatingsmaður. Tá hann dittar sær at koma við slíkari skuldseting, má hann eisini vera maður fyri at standa við henni og siga, hvat hon byggir á. Tobbi tykist annars at hava yvirtikið leiklutin, sum Óli Breckmann hevur havt í eina øld, nevniliga at hunddálka sínar samstarvsfelagar. Eins og vit hava talað at atburðinum hjá ÓB øll hesi ár gera vit tað eisini nú Tobbi tykist velja somu leið. Tað hevur einki við at skerja skrivi- og talufrælsið at gera. Tað hevur nakað við virðing og sømiligheit at gera. Málburður og álop av tí slag talan her er um byggir ikki nakað land, enn minni skapar tað nakað álit millum teir, sum samstarva skulu at byggja hetta landið.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Mótmæli viðvíkjandi tíðindaskrivinum »Mungát gott fyri sinnið« í Sosialinum 13. juli 2002

Felagið Sinnisbati vil við hesum mótmæla hesum tíðindaskrivi frá Restorffs bryggjarí.

Yvirskriftin er sera óheppin, sæð frá sjónarmiði Sinnisbata, sum umboð fyri sinnisveik og — sjúk fólk og teirra avvarðandi, tí greinin gevur beinleiðis ljóð fyri, at nevnda øl frá Restorff er gott fyri sinnið.

Hetta meta vit verða eina villeiðandi orðing.

Yvirskriftin og innihaldið í greinini kann elva til at fólk, sum eru sinnisveik trúgva greinini og fara at keypa ølið, tí ætlanin við tíðindaskrivinum er júst ein reklama fyri at fáa fólk at keypa ølið. Fyri fólk sum taka heilivág kann vera beinleiðis skaðiligt at taka inn rúsandi løg.

Psykiatrisku deildirnar hava mangan verið ovbyrðaðar av at viðgera fólk, sum eru innløgd, tí tey fingu heröindi vegna øl- og rúsdrekkanýtslu.

Sinnisbati vónar at Sosialurin, sum er kendur fyri at vera ein ábyrgdarfullur fjølmiðil, tekur hetta skriv til eftirtektar og ansar betur eftir í framtíðini.

Vinarliga

Svenning av Lofti, formaður

Helena Dam á Nestabø heldur ólavsøkurøðuna

ÓLAVSØKURØÐA
Rúnar Reistrup

Ólavsøkurøðarin í ár verður fyrrverandi løgtingslimur og landsstýrismaður Helena Dam á Neystabø.

Helena Dam á Neystabø var í nógv ár formaður í Sjálvstýrisflokkinum.. Hon fór frá sum formaður í fjør og stillaði, tá saman um kom, ikki upp til løgtingsvalið í apríl.

Tað er Tórshavnar Ítróttarráð, sum hvørt ár heitir á eitt fólk um at halda ólavsøkurøðuna, ið hevur verið fastur táttur á ólavsøku í nógv ártatíggju.

Boringin dregur út

OLJULEITING
Jan Müller

Ætlanin var fyrst at bora í mai. Síðani varð hetta útsett til juli. Eftir øllum at døma dregur boringin enn longur út og verður neyvan fyrr enn í august. Talan er um boringina hjá Amerada Hess beint hinumegin markið. Ein boring, sum skal siga, um fundið gjørt varð á føroyskum øki í fjør, er rakstrarverdugt. Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess sigur, at teir fáa ikki gjørt annað enn at bíða. Teir standa til at brúka boriskipið West Navion, sum í løtuni borar fyri oljufelagið Marathon í kanadiskum øki. Her er mannagongdin tann, at tú mást bíða til tann boringin er liðug. Síðani tekur tað kanska eina viku at sigla og koma uppá pláss á Atlantsmótinum. Tað er altíð ómøguligt at siga við fullari vissu, nær ein boring er liðug. Aftrat hesum kann so eisini viðmerkjast, at West Navion hevur havt fleiri trupulleikar, sum hava seinkað boringini í Kanada.

- Hetta fáa vit einki gjørt við. Eg vóni, at teir skjótt verða lidnir við boringina, men helst verður tað ikki fyrr enn í august, at vit kunnu fara undir at bora brunnin í 204 lisensinum á bretskum øki sigur Ben Arabo.

Fyri Føroyar og fyri oljufeløgini, sum hava leitiloyvi, er umrødda boring hjá The Faroes Partnership sera stóran áhuga og týðning. Eitt positivt úrslit vil av álvara seta gongd á aðra leiting í økinum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktíónin:
tel. 220507 tel. 333843
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Viðmerking til greinina »Gudiligur ørskapur forpestar meira enn nøkur ølsøla« eftir Hilmar Simonsen 4/7-2002

Svein Petersen

Greinin hjá tær fekk meg ovfarnan av hugburðinum. Har tú góðtekur næstan alt tað, sum er ringt og ikki gott.

Ikki føla teg ov nógv raktan, Hilmar. Tú ert helst eitt gott menniskja, men ert blindur í tínum hjarta. Men tað kunnu vit rætta eitt sindur uppá báðir.

Hilmar, eg haldi tú hevur misskilt áskoðanina hjá Bill Justinussen. Havi varhugan av at tú hugsar at Bill er úti eftir at oyðileggja alt tað góða. Tað er akkurát øvugt. Hann roynir at niðurbróta tað, sum er ringt og uppbyggja tað góða.

Bill forfylgir ikki nøkrum ávísum bólkum í samfelagnum. Men ger eina royndt at hjálpa hesum, ið tú kallar forfylgd.

Tú tosar um at tað væl kann vera at rúsdrekka elvir til trupulleikar, um tað ikki verður brúkt við hóvsemi. Soleiðis er tað í dag og soleiðis hevur altíð verið.

Eg skal minna teg á, at umleið 50 fólk doyggja árliga av alkoholismu í Føroyum. Eg spyrji bara, kann hetta góðtakast, skal hugsanin vera, at soleiðis er tað í dag, og soleiðis hevur altíð verið…

Ein nokk so vanlig hugsan hjá føroyingum í dag er, at tað er bara spell, at hann/hon ikki hevur tamarhald á rúsdrekka/evnum. Tað kann eg ikki blanda meg uppím tað mugu tey um.

Eg kann lýsa eitt líknandi dømi, sum heilt sikkurt ikki varð góðtikið millum manna.

Dømi: Hugsi mær at frí søla av dynamittstongum skal vera í Føroyum (fyri at fylgja tíðarandanum). Eg kann ikki gera nakað við, at umleið 50 fólk spreingja seg sjálvan í luftina hvørt árið, tí tey duga ikki at brúka dynamitt. Tað kann eg ikki gera nakað við, ella kann eg?

Hilmar? Minst til at rúsdrekka/evni drepa – dynamitt drepur. Kann hetta góðtakast???

Eisini nevnir tú, at nýtsla kann vera gagnlig, meðan ovurnýtsla er av tí ónda. Tú nevnir misnýtslu av religión.

Eg kann rættleiða teg við at rættur kristindómur ongantíð kemur undir misnýtslu. Hetta er ikki ein pástandur, tí tað renna streymar av kærleika, friði og fyrigevingaranda frá einum sonnum trúgvandi í dagligdegnum.

Tá ið ein Jesus trúgvandi fær mótgongd, er viðkomandi á rættari leið. Tí samvitskan talar at hjá mótpartinum (Jesus bleiv jú eisini spottaður).

Tín misskiljing av religión kann eisini vera avleiðingar frá teimum, ið eru navn kristin. Tað eru fólk, sum ganga undir heitinum at vera kristin. T.d. »Føroyar eru eitt kristið land«. Tó eru hesi ikki persónliga kristin og kunnu tí geva ástoyt fyri hini.

Eisini kemur tú við nøkrum fáum dømum um positivar avleiðingar frá alkoholi. Hví nevnir tú ikki nevativar avleiðingar eisini fyri at fáa eina breiða niðurstøðu? Um tú ert erligur, so fært tú skjótt stórsigur av neg. avleiðingum. Dømi: Harðskapur, ferðsluvanlukkur, lygnir, sjálvmorð, alkoholisma brýtur út og viðførir ofta deyðan.

Havi uppfatan av uttan at kenna Bill persónliga, at hansara stívrendu pástandir, sum tú rópar tað, ikki eru pástandir, men heldur íblástur frá Gudi til Hann. Tí Bill roynir í veruleikanum at hjálpa fólki úr neyð, og eftir mínum tykki er tað ein góð gerð. Gud er kærleiki, so alt tað góða, vit gera, er frá Gudi. Tí í okkum menniskjum býr einki gott, av okkum sjálvum.

Eg vil ikki fara ov langt inn í Bibliuna nú, men kann leggja afturat, at alt, sum skrivað er av Gudi gjøgnum profetarnar fyri fleiri 1000 árum síðani, er gingið út, so ikki kann sigast, at tað bert eru pástandir, men veruleiki.

Hilmar! Tú kanst gera eina royndt at lesa sjálvur, tí uttan at lesa og uppsøkja Harran Jesus verða tað sjálvandi pástandir og ikki upplivingar.

Mín meining er, at politikkur, grundaður á kristindómin og ikki kristindómur á politikkin, er fínur.

Hví ikki tað í einum sokallaðum kristnum landi?

Bill! Eg meini at tú eigur ikki at boykotta sølu av rúsdrekka, tí tað skapar øsing.

Eg haldi einasta rætta leiðin til at broyta hugburðin til rúsdrekka/evnir, er at menna upplýsingararbeiðið um avleiðingar, sum standast av nýtslu og misnýtslu. Hetta tekur langa tíð. Miss ikki mótið.

Eg veit, at stórt fyribyrgingararbeiði verður gjørt. Tað er gott. Men nakað, ið er stórt, kann blíva størri.

Við friðarkvøðu til Hilmar og Bill.

Umgdómar og lesandi

Hans Birgir Hansen

Tað er grundleggjandi skeivt og írættvíst skipa landspolitiskt, tá okkara ungdómar, fólkaskúlanæmingar, og lesandi føroyingar og lærlingar liva skattafrítt í dag.

Tað er eingin av øllum hesum ein í túsundtals lesarabrøvum, hevur funnist harðliga at, og úti í øllum handils- og vinnulívið, ið kann sammetast við lønmóttakarar.

Tað hevði ikki komið fyri at hesi arbeiddu við síðuna av skúlum og lærustovnum, høvdu fakfelagsforkvinnur/formenn/nevndarlimir rokt sína fakfelagsskyldu.

Tí tá høvdu vit ikki bíliga arbeiðsmegi at undirgrava sáttmálabundnu fakfelagslønirnar kring landið, Ið ein hevur funnist harðliga at í føroysku bløðunum.

Tað er grundleggjandi skeivt og órættvíst av hesum at hjálpa arbeiðsgevarum mótvegis fakfeløgum, ið at vera skrúubrekkarar, vit siggja við verkfallinum.

Okkara ungdómur og lesandi føroyingar og lærlingar kenna seg ikki at hava nakra samfelagsskyldu/-ábyrgd mótvegis meninskjum, kring alt landið.

Tað er eitt óluksáligt svínari, at vanligir lønmóttakarar, skattaborgarar, skulu figgja allan lestrarstuðul, lesandi heima og uttanlands njóta gott av.

Tað skal vera funnist harðliga at stuðulsstovnum, ið soleiðis oyðslar við skattaborgarans peningi til øll hesi lesandi ein kemur aftur til í bløðunum.

Tað er eitt óluksáligt svínarí, at hesi við síðuna av lestrarstuðlu kunnu forvinna 15.-17.000 kr skattafrítt á hvørjum ári, ið síðan gevast at arbeiða.

Tað eigur av landspolitikkarum at vera skipa fyri at øll faklig lestrarútbúgving verður tillaga eftir tørvinum á øllum fakligum økjum í dag.

Tað er avgerandi neyðugt at fáa øll lesandi uttanlands at venda heim aftur at taka við størvum, sum føroyingar leggja frá sær vegna aldur.

Bjarnaýl á hásumri!

Dia Ellindsson
tjóðveldismaður, Runavík

Eg vil hervið veita tykkum báðum, Torbjørn Jacobsen og Heina O. Heinesen, eina hjartans tøkk fyri at tit eru ósamdir við Bjarna Djurholm og Fólkaflokkin um Føroya Fiskavirking.

Hesin maður og flokkur eru eitt tekniskt fenomen av eini heilt aðrari planet, reint menniskjaliga tala. Her koma tit inn í eina ónda ringrás vinnuliga.

Her er talan um ráa privat-kapitalismu.

Eg sakni Nikláa Petersen í hesum orðaskifti. Hann hevur sjálvur sagt, at hann brennur fyri vinnulívinum.

Bjarnaýl á sumri eru lítið hugalig. Legg alt á ís.

Viðmerking:

Christian Olsen
Klakksvík

Hví sleppur landstýrismaðurin undan ábreiðslunum um Lorvíksfjarðarleiðina?

Vælvitandi um vánaligu viðurskiftini Lorvíksfjarðarleiðini, hava vit í longri tíð lisið síðu upp og síðu niður í bløðunum um óskilið á hesi leið uttan nakað sum helst hendir. Hesar ábreiðslugreinar, skrivaðar av einum Norðoya Fólkaflokstingmanni, hava einans verið vendar í móti Strandferðslustjóranum og leiðsluni har.

Ein framstandandi partamaður hjá sama tingmanni, segði, fyri nøkrum árum síðani, at nú var tíðin komin at rudda "SOSIALISTAREIÐRIÐ Á STRANDFERÐSLUNI".

Fólkaflokkurin hevur havt landsstýrismannin við ábyrgd fyri Strandferðslu, ferðavinnu og vinnumálum, síðani hesi orð vórðu søgd, men hesin sleppur fullkomuliga snikkaleysur undan ábreiðslunum frá floksfelaga sínum í Norðoyggjum, fyri drál og ábyrgdarloysi.

Fyri stuttum samtykti landsstýrið ikki at játta pening til avloysaraskip fyri "Smyril". Einasta grundgeving var, at hetta var ov dýrt, og sum rosinan í pylsuendanum, varð lagt aftur at, at landsstýrismaðurin við ábyrgdini fyri Strandferðsluni ikki var við á fundinum – soleiðis slapp hann eisini snikkaleysur burtur úr hesum trupulleikanum.

Nú gongur á fimta árið hjá hesum flokkinum, sum skuldi rudda upp í hesum hurlivasanum, men onki røkist fyri nøkrum bata í bræði. Eitt skal sláast rimmar fast: Landstýrismaðurin í ferðavinnu, strandferðslu og vinnumálum hevur ovastu ábyrgd av hesum hurlivasanum. So kanónirnar hjá Norðoya Fólkaflokstingmanninum hava fullkomuliga skeivt sikti.

Vend teimum heldur rættan veg! Og gev landsstýrismanninum tínar ábreiðslur í staðin fyri at harta tey, sum royna alt tað tey kunna, uttan at fáa nakran sum helst stuðul frá landstýrismanninum í hesum máli.

Tøkk

I forbindelse med min mand

Daniel Juul Danielsens

pludselige sygdom og bortgang lørdag
den 6. juli 2002, vil jeg gerne af hele mit hjerte sige
tusind tak til: Alarmcentralen 112, ambulancereddere
og lægen, som hjalp og beroligede mig i telefonen
indtil hjælpen nåede frem til os.
Til læger og sygeplejersker på sygehusen afd. B8
for den kærlige pleje og omsorg til Daniel,
samt omsorg for mig.
Til familie og venner for en uvurderlig støtte og
omsorg, samt den store hjælp, de alle har udvist mig
i en meget svær tid.
Til pastor Kjartan Mørkøre skal lyde en stor tak for
at du ville forestå Daniels bisættelse den 10. juli 2002
fra Vesturkirkjan og Kirkjubø kirkegård,
som du gjorde så smukt.
Samstundis takka vit fyri sýnda samkenslu.
Takk fyri blómur og kransar og takk til tykkum øll,
sum fyldu Daniel til hansara seinasta hvíldarstað.

Vegna familjuna
Lizzie og Hildigunn